FYLGISKJAL 9

LM-018/2022

Landsfelag Pensjónista

Argir 19.08.2022

Almannamálaráðið

Verður sent við telduposti til amr@amr.fo

HOYRINGSSVAR

Almannamálaráðið hevur sent Landsfelag Pensjónista til hoyringar:

Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um familjuískoyti
(oljuískoyti til húski)

Landsfelag Pensjónista hevur fylgjandi viðmerkingar:

Landsfelag Pensjónista gleðist um, at fólk kunnu fáa 7.000 kr. í hjálp til tær øktu oljuútreiðslurnar til upphiting av bústaði.

Treytirnar fyri at fáa oljuískoyti eru tvinnar: Ein er at inntøka ikki má koma uppá ávíkavist 290.000 - 410.000 kr. og hin er, at ein má ikki eiga meira enn 30.000 kr. - 50.000 kr. Hetta førir við sær, at 80-90% av øllum pensjónistum onki oljuískoyti fáa, tí teir flestu hava egin hús, og nakað av uppsparing, ið teir goyma til viðlíkahald.

Eftir hesum uppskotinum verður ognin ov stór, og tí fáa tey ongan oljustuðul, sjálvt um tað serliga eru tey eldru, sum krevja hita, sita í eldri húsum, og harvið brúka nógva olju. Eru tað nøkur, ið treingja til oljuískoyti í hesum døgum, so eru tað pensjónistarnir. Hækkanin í oljuprísinum hevur longu tikið ein part av teirra uppsparing, sum skuldi verið til viðlíkahald.

Í Danmark hava tey gjørt tað sera einfalt at hjálpa teimum pensjónistum, ið eru ringast fyri. Har fáa allir pensjónistar, ið frammanundan fáa "ældrecheck", eina eyka upphædd uppá 2.500 kr. Tó kunnu teir eisini søkja um ein hitakekk uppá 6.000 kr., og har kann inntøkan koma heilt upp til 650.000 kr.

Okkara tilráðing er, at stuðulin bert skal roknast út frá inntøkuni, tí tá høvdu nógvir pensjónistar fingið oljuískoyti, og tað er harðliga tiltrongt, tí teir forvinna ikki so nógv, og skal eitt ískoyti ikki vera grundað á ognina.

Ein møguleiki í Føroyum er harafturat, at teir pensjónistar, ið fáa brennistuðul í dag, kundu fingið eitt ískoyti til tann hækkaða oljukostnaðin, og tað er sera lætt at umsita. Tó skulu hesir pensjónistar eisini kunnu søkja um oljuískoyti.

Vinarliga
v. Landsfelag Pensjónista

Beate L. Samuelsen, forkvinna